UMHVØRVIS- OG VINNUMÁLARÁÐIÐ

J. nr.: 22/10290-3

# Reglugerð
# fyri
# veiting av stuðli til føroyskt framleitt neyta- og kálvakjøt

## Endamál

**§ 1.** Endamálið er at stimbra undir vinnuliga kjøtframleiðslu í Føroyum.

## Heimild

**§ 2.** § 3 í kunngerð nr. 76 frá 15. mai 2018 um stuðul til landbúnaðin heimilar stuðulsveiting til føroyskt framleitt neyta- og kálvakjøt.
*Stk. 2.* Henda reglugerð ásetur treytir fyri nýtslu av játtan á konto 6.33.2.10. Landbúnaðarstuðul undirkonta 02. Neytakjøt.

## Stuðulstreytir

**§ 3.** Stuðul kann latast vinnuligum bóndum (einstaklingum, virkjum ella feløgum), sum eru bókhaldsskyldug og mvg-skrásett, ið sjálv ala neyt og kálvar fram til slátur.
*Stk. 2.* Stuðulin verður býttur í tveir flokkar; ávikavist:

- Neyt 1 – 16 mðr. (kálvakjøt)
- Neyt eldri enn 16 mðr. (neytakjøt)

## Umsiting

**§ 4.** Búnaðarstovan umsitur stuðulsjáttanina.

*Stk. 2.* Búnaðarstovan tryggjar, at ásetingarnar í kunngerð nr. 76 frá 15. mai 2018 um stuðul til landbúnaðin og ásetingarnar í hesi reglugerð eru loknar.

*Stk. 3.* Búnaðarstovan kann við stakroyndum eftirkanna rættleikan í uppgerðunum.

## Umsókn

**§ 5.** Búnaðarstovan hevur serligt oyðublað til endamálið *"Studningur til neytakjøt – umsóknarblað"*. Umsóknarblaðið liggur á heimasíðuni hjá Búnðarastovuni www.bst.fo.

*Stk. 2.* Umsókn skal latast Búnaðarstovuni í seinasta lagi ein mánað eftir, at neytið er slaktað.

*Stk. 3.* Seinasta freist at lata inn umsókn er 15. januar í árinum eftir, at neytið er slaktað.

## Játtan

**§ 6.** Stuðul verður latin í tann mun, játtan er tøk á Løgtingsfíggjarlógini, konta 6.33.2.10.02. landbúnaðarstuðul til neytakjøt. Stuðulsveitingin verður regulerað í mun til innkomnar umsóknir.

*Stk. 2.* Meginreglan er, at játtanin á Løgtingsfíggjarlógini verður býtt í tveir partar: 50% til neyt 1–16 mðr. og 50% til neyt, eldri enn 16 mðr.

*Stk. 3.* Stuðulin kann í mesta lagi vera:

- fyri neytakjøt 1-16 mðr. 30 kr./kg
- fyri neytakjøt eldri enn 16 mðr. 20 kr./kg
- fyri neytakjøt á útoyggj 30 kr./kg

**Útgjald**

**§ 7.** Stuðulin verður í fyrstu syftu útgoldin sum eitt ávegisgjald upp á 10 kr./kg. Við árslok verður gjørt upp í mun til innkomnar umsóknir fyri árið, og endalig stuðulsupphædd verður síðani rindað umsøkjarunum.

*Stk. 2.* Stuðul verður endaliga avroknaður og útgoldin, tá allar umsóknir eru móttiknar og viðgjørdar og stuðulsmóttakari hevur latið Búnaðarstovuni roknskap sambært ásetingunum í §§ 21-22 í kunngerð nr. 125 frá 19. september um lógarbundna játtan og stuðulsjáttan.

*Stk. 3.* Seinasta freist at lata Búnaðarstovuni roknskap er 1. mars árið eftir stuðulsárið.

**Gildiskoma**

**§ 8.** Hesar reglur koma í gildi beinanvegin.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, 17. juni 2022

Magnus Rasmussen
landsstýrismaður

/Herálvur Joensen
aðalstjóri